ítróttur

Nr. 47 • fríggjadagur • 8. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

StÍF – Kyndil 33-21 (16-9)

# StÍF vant burtur úr Kyndli



Einki var at ivast í, tá StÍF tók ímóti Kyndli mikukvøldið. Heimaliðið vant snøgt sagt burturúr gestunum

**Longu eftir tíggju minuttum høvdu strandingar víst Kyndli, at teir einki fingu við sær aftur til Havnar. Sum dysturin leið var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi gerast**

HONDBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Strandingar vunnu ein knúsandi sigur á Kyndli í útsetta dystinum millum liðini. Dysturin varð leiktur í høllini á Skála mikukvøldið, og líka frá byrjan var tað sólarklárt, at strandingar fóru at vinna. Spurningurin var bara, hvussu stórur sigurin skuldi vera, og hann kundi verið nógv størri enn hann gjørdist.

### Livandi múrurin

Tað var stuttligt at vera í høllini á Skála mikukvøldið. Vart tú – ella royndi at vera – neutralur áskoðari ella helt tú við StÍF hevði tú ríkiligt at fegnast um, meðan tað helst var minni hugaligt at vera gestur í høllini um hjarta bankaði fyri teimum grønu úr Havn.

Sæð við hondbóltseygum var dysturin eitt greitt tekin um, at landskappingin í ár er farin í tveir ella tríggjar partar, har trý tey ovastu liðini eru í einum flokki fyri seg. Tað sæst kanska best við, at tað eru níggju stig frá StÍF niður til næsta liðið í stigatalvuni, og tað er – Kyndil.

Nú skal havast í huga, at dysturin varð leiktur á heimavølli hjá strandingum, men tað eigur kortini ikki at bera til, at vinna við so nógvum málum.

Men tað ger tað kortini, og uppskriftin til ein so stóran sigur er ein sera góð verja og ein upp aftur betri málverji. Tað man vera fáur í føroysku landskappingini, sum tekur málmannin hjá strandingum, og sum hann leikti mikukvøldið er eingin sum kemur í nær námind av honum.

Líkamikið hvat áleypararnir hjá Kyndli gjørdu, so var hann har onkusvegna, og tað pilkaði til seinast alt mót úr havnarmonnum.

Serliga eigur Petur Martin Johansen, sum fyri fyrstu ferð í ár, leikti við Kyndli at hava iðra seg bæði grønan og svartan. Hann var púra einsamallur við Marian Cirlojonescu einar fýra fimm ferðir, men tað var so eiðasørt, at hann fekk bóltin fram við rumenanum. Til seinast gav hann skarvin yvir og fór út aftur á beinkin.

### Teir ungu í hopla

Var Marian ein knassi í málinum, so var ungi skálamaðurin, Sveinur Justinussen tað so sanniliga í álopinum. Fleiri ferðir vísti hann, hvussu einastandandi góð hondbóltsevnir hann hevur, og hann vísti, at fyri tað at tú ert ungur og tí ikki hevur so stórar royndir, so er einki sum forðar fyri, at tú førir teg fram sum ein gamlan rev.

Sveinur gjørdist toppskjútti hjá strandingum við átta málum, og tá skal havast í huga, at hann als ikki var við teir seinastu tíggju minuttirnar. Tá sat hann uttan fyri við einum trælæri, men tá kundi tað gera tað sama. Sigurin var langt síðani komin til høldar og eingin orsøk var at leggja størri trýst á lærið enn neyðugt.

Eisini hjá Kyndli var tað einum av teimum ungu sum tað glógvaði í. Høgni Klein gjørdi ikki færri enn 11 mál og hann var fyri so vítt tann einasti kyndlaleikarin sum veruliga dugdi at skjóta fram við livandi múrinum hjá strandingum.

Tá hetta er sagt, eiga vit at leggja afturat, at StÍF skifti málverja tá umleið eitt korter var eftir av dystinum. Pól Jákup Poulsen loysti Marian av, og vit kunnu bara staðfesta, at hann stóð seg heilt einastandandi væl. Hann fekk ikki fatur á øllum, men hann stóð ikki nógv aftan fyri Marian.

Í hinum endanum av vøllinum hevði Jóhan Danielsen ein keðiligan dag. Tað kundi næstan gera tað sama, hvat hann gjørdi, tí í allarflestu førum var hann latin upp til sín sjálvs. Tað er frammanundan trupult at vera málverji og tað gerst jú ikki betri av, at verjan svíkir.

### Gott at byggja á

Sjálvt um sigurin hjá strandingum gjørdist stórur, sær kanska ikki so heilt vónleyst út hjá Kyndli. Eingin ivi er um, at hetta árið er farið fyri skeytið, men tá hugsað verður um, at fólkið, sum nú leikar á Kyndlaliðnum er ungt, er lítið at ivast í, at vit koma at hoyra nógv meira til hesar menninar í framtíðini.

Eingin skal heldur ivast í, at tað eru nógvir mans í hópinum hjá Kyndli, sum hava góð evnir, men tað var bara ikki teirra dagur í høllini á Skála mikudagin. Soleiðis gongur við hvørt og tað má ein taka við.

Strandingar hava fingið tað teir skulu hava í ár við tað, at teir hava vunnið steypakappingina. Tað er ein klænur møguleiki fyri, at teir fáa silvur, men hann er so klænur, at hann hvørvur, tá hann vendir liðina til.

Vestmenningar hava ikki fingið tað teir ætlaðu sær – enn. Mikukvøldið fingu teir kortini nakað at hugsa um, tí videomaðurin hjá vestmenningum var í høllini á Skála og hann er komin aftur til Vestmanna við filmi av einum liði, sum spældi serstakliga væl. Um tað kann brúkast til nakað er so ein onnur søga ...

### Dysturin í tølum

StÍF: Sveinur Justinussen 8, Costin Dumitrescu 5 (1), Artur Johansen 5, Bent Djurhuus 5, André Danielsen 4, Marius Joensen 3 og Jón Rasmussen 3
Kyndil: Høgni Klein 11, Jónleif Sólsker 3 (1), Bárður Johannesen 3, Janus Einar Sørensen 3, Ken Zachariasen 1
Brotskøst: StÍF 2 (1), Kyndil 3 (1)
Útvísingar: StÍF 2, Kyndil 4
Dómarar: Kristian Johansen og Hartvig Joensen



# Kyndil vil bíða

*Tað skuldi fyrst og fremst verið á vøllinum, men partvíst er niðurflytingarstríðið millum Sóljuna og Kyndil nú flutt til skrivaraborðið hjá Hondbóltssambandinum*



**Orsakað av einum útsettum dysti frá grundspælinum, er botnstríðið í bestu kvinnudeildini nú endað á skrivaraborðinum hjá Hondbóltssambandinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Dysturin millum kvinnuliðini hjá Sóljuni og Kyndli, sum sambært kappingarskipanini skal spælast fríggjadagin 15. mars, verður helst tann, sum ger av, hvat lið skal niður úr bestu kvinnudeildini, tá kappingarárið er lokið.

Í løtuni eru tvey stig á muni millum liðini, men tað hoyrir við til søguna, at Sóljuni enn restar ein dyst frá grundspælinum, og tá hesin er leiktur, er talan møguliga bert um ein mun upp á eitt stig.

Júst møguleikin fyri hesum eina stiginum kann hava avgerandi ávirkan á, hvussu endaliga støðan í deildini fer at verða. Í verandi støðu kann Kyndil tapa á Giljanesi, men kortini varðveita sætta plássið í deildini grundað á ein betri málmun. Men um Sóljan fær stig burtur úr útsetta dystinum frá grundspælinum, so hava tær møguleika at fara upp um Kyndil við einum sigri.

Trupulleikin hjá Kyndli er, at tær í verandi støðu ikki kenna fortreytirnar undan dystinum, og spurningurin tykist í løtuni vera, um hetta eisini fer at fáa avleiðingar fyri ætlaða dystin millum Sóljuna og Kyndil. Tað stendur í øllum førum greitt, at Kyndil hevur sera lítlan áhuga í at fara vestur, um dysturin

– Tað er so sera einfalt. Vit fara ikki vestur at spæla, um dysturin millum StÍF og Sóljuna ikki er avgreiddur áðrenn.

Somikið avgjørdur er venjarin hjá Kyndli, Rógvi Nielsen, tá spurt verður, hvørja áskoðan tey hava í hesum málinum.

– Høvdu vit vunnið mikukvøldið, so var talan sjálvandi ikki um nakran trupulleika, men vit kunnu ikki liva við, at ein útsettur dystur frá grundspælinum møguliga kann avgera spurningin um upp- ella niðurflyting. Og ikki minst, tá hesin dysturin møguliga verður avgreiddur, eftir at dystirnir í endaspælinum er lidnir.

Málið um útsetta dystin liggur í løtuni hjá dómsnevndini hjá Hondbóltssambandinum. Dysturin varð upprunaliga útsettur, tí høllin á Giljanesi ikki var tøk. Hann varð síðani fluttur, men tá hann skuldi spælast seinnu ferðina, komu strandakvinnur ongan tíð í Vágoynna. Dómarar og leikararnir hjá Sóljuni stóðu annars og bíðaðu, men har gjørdist einki.

StÍF hevði tá givið avboð, tí talan var um dyst mitt í viku, og trupult var hjá leikarum at fáa frí. Hesi boð vóru tó ongan tíð komin til Sóljuna, og tí vilja tey vera við, at tær hava vunnið dystin uttan at spæla.

Hetta hava tey framhaldandi hildið fast um, hóast kappingarnevndin hjá HSF í fleiri umførum hevur sett dystin á skránna. Seinastu ferð, hetta varð gjørt, var ætlanin, at dysturin skuldi avgreiðast 16. februar, men tá kærdi Sóljan avgerðina hjá kappingarnevndini til dómsnevndina, og har liggur málið í løtuni.

Fyrrapartin í gjár fingu vit ikki fatur á formanninum í dómsnevndini, Niels Nattestad. Tað eydnaðist okkum tó at fáa fatur á Jógvan Elias Winther Poulsen, sum eisini situr í dómsnevndini. Sum so vildi hann ikki gera nakrar viðmerkingar til málið, men hann segði, at ein avgerð um spurningin er væntandi fyrsta dagin.

So hjá Kyndli og Sóljuni er neyvan annað at gera í løtuni enn at brynja seg við toli.

StÍF – Kyndil 23-20 (11-10)

# Enn eitt ár millum tær bestu

**StÍF-kvinnurnar gjørdu bart, tá tær leiktu útsetta dystin móti Kyndli mikukvøldið. Fyrri hálvleikur var javnur, men tíðliga í seinna hálvleiki tóku strandingar eina fýra máls leiðslu, sum tær varðveittu til dysturin var liðugur**

HONDBÓLTUR - KVINNUR
*Sveinur Tróndarson*

Besta kvinnulið hjá StÍF hevur endaliga tryggjað sær enn eitt ár í bestu hondbóltsdeildini. Tað gjørdu tær við sigrinum á Kyndli í høllini á Skála mikukvøldið. Sigurin var upp á fýra mál og sjálvt um Kyndilskvinnur royndu at taka sigurin frá strandingum, komu tær ongantíð so mikið nær, at tær veruliga hóttu heimaliðið.

### Uppiborin heimasigur

Tað er eingin, sum eftir dystin, hevur nakað at siga til, at tað vóru strandingar, sum vunnu. Heimaliðið var nógv ágrýtnari enn gestirnir, og sjálvt um dysturin ikki fer í søgubøkurnar, sum tann vakrasti hondbóltsdysturin, so fegnast StÍF-kvinnurnar helst um, at hesin dysturin tryggjaði teimum enn eitt ár millum tey bestu hondbóltsliðini.

Annars var fyrri hálvleikur sera javnur. Strandingar royndu at sleppa frá Kyndli, men tær grønu megnaðu at svara aftur, hvørja ferð. Eisini tá StÍF var komið upp á 9-6 í fyrra hálvleiki.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki kom tó glið hjá strandingum. Eftir at Kyndil hevði javnað hálvleiksleiðsluna, bundu strandingar fyri og fóru upp á 18-13. Hesin munur var ov stórur til, at Kyndil kláraði at koma aftur í aftur, og so var dysturin vunnin fyri heimaliðið.

Sum sagt er synd at siga, at hetta var ein vakur heimadystur, men tað leggja strandakvinnur helst líka í. Tær hava vunnið og tað var í roynd og veru tað sum tað snúði seg um.

### Kyndil í trupulleikum

Hevur dysturin givið strandingum nakað at fegnast um, eigur hann samstundis at hava givið venjaranum hjá Kyndli – og leikarunum við – nakað at hugsa um. Dysturin í høllini á Skála vísti nevniliga, at Kyndil hevur sera trupult við at fáa spælið at hanga saman.

Í álopinum vóru tað bara Lotte og Annika sum vóru nøkur hóttan – tær gjørdu níggju av tíggju málum í seinna hálvleiki – og tað gjørdi tað alt ov lætt fyri verjuna hjá strandingum at byrgja fyri. Í verjuni vóru tær grønu alt ov passivar, og tað gjørdi, at strandingar fingu frið at spæla sítt uppbyggjandi spæl, stórt sæð uttan at Kyndil royndi at leggja ímillum.

Eisini kann tað tykjast merkisvert, at kyndlaleikararnir brúka so stóra orku til at rópa innanhýsis heldur enn at gera ein felags innsats fyri at vinna. Gamaní er tað troyttandi, at ein avlevering ikki kemur í tí hædd hon skal, men tað er ikki nóg stór orsøk til at skræða hvønn annan sundur. Høvdu leikararnir heldur brúkt orkuna til at skipa innanhýsis spælið er ikki óhugsandi, at tær høvdu fingið meira burtur úr.

Strandingar vóru meira siðiligir og tær stríddust væl. Enn einaferð vóru tað tær báðar Alina Olaru og Ileana Manulescu, sum gingu undan og gjørdu málini, men tá Kyndil fór undir at mansverja tær, vístu hinar, at tær sanniliga eisini duga at arbeiða hart og gera mál. Serliga beit Anna Maria Berthelsen væl frá sær hesa løtuna.

### Fingu tað tær fóru eftir

Samanumtikið kann staðfestast, at sigurin hjá StÍF var fult uppiborin. Strandingar vístu, sum sagt besta stríðsviljan og tað vigar við hvørt líka nógv sum vakurt spæl.

Dysturin var sum sagt ikki serliga vakur, men umstøðurnar hjá liðunum báðum, loyva tí kanska heldur ikki. Tá bæði liðini liggja í niðara enda av deildini er tað heldur stríðsviljin sum gevur stigini enn tað vakra spælið, og soleiðis var mikukvøldið.

Í seinna hálvleiki vístu strandakvinnur, at tær duga at fáa tað burtur úr, sum dómararnir loyva. Seinastu tíggju minuttirnir av dystinum vóru serstakliga keðiligir av tí at tveir strandingar vóru mansvardir, men hinar fýra, sum framvegis vóru við í spælinum, gjørdu sína skyldu við at koyra álopini so langt sum tær fingu loyvi til.

Tað var ikki snøgt, men tað var effektivt. Tað var samstundis tað, sum skuldi til fyri at pilka tað seinasta burtur úr Kyndli og tað eydnaðist eisini. Tær grønu vóru mótfalnar og gjørdu tí alt ov lítla mótstøðu.

### Dysturin í tølum:

StÍF: Alina Olaru 7, Ileana Manulescu 6, Poula D. Olsen 4, Anna Maria Berthelsen 3, Sunfríð B. Jacobsen 2 (1), Anna B. Danielsen 1
Kyndil: Lotte Sørensen 8, Annika Ljósstein 8 (2), Anja Johannesen 2, Palma Petersen 1, Ann Hansen 1
Brotskøst: StÍF 1, Kyndil 3
Útvísingar: StÍF 1, Kyndil 3
Dómarar: Kristian Johansen og Hartvig Joensen